Tíðindabrævið
# Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 3 september 2000 1. árg.

# Høfn: Miðvís satsing



*Satsingin uppá ferðavinnuna hevur havt við sær økt virksemi og størri fólkatal. Undir tekstinum niðanfyri sæst gongdin í fólkatalinum frá 1988 (1978 íbúgvar) til 1999 (2412 íbúgvar)*

Á Suðureysturlandinum í Íslandi liggur bygdin Høfn á Hornafirði. Fyri bert seks árum síðani var Høfn egin kommuna, men síðani hevur hon lagt saman við fimm øðrum undir navninum Hornafjarðar Kommuna.

- Samanleggingin hevur stórt sæð gingið væl, tí kommunurnar hava framt hana av sínum eintingum, og tí at Høfn, ið er nógv størsta bygdin, ikki hevur havt nakran at kappast við sum fyrisitingarbýur í kommununi, sigur Karl Benediktsson, geografur á Háskóla Íslands.

Kommunurnar hava eisini samstarva í stóran mun fyri samanleggingina, upplýsir Albert Eymundsson, ið er býarstjóri í Hornafjarðar kommunu, t.v.s. hægsti embætismaður. Hann sigur, at fólk úr allari kommununi eru altíð væl komin at siga sína hugsan, at koma við hugskotum ella atfinningum.

- Men ætlanin er, at eg við jøvnum millumbilum skal ferðast til bygdirnar fyri at tryggja, at øll sjónarmið verða hoyrd og sostatt verða viðgjørd í býráðnum.

Í Hornafjarðar kommunu, hevur gingið væl. Fólkatalið vaks 13% frá 1987 til 1991, men kvinkaðist so nøkur ár, men frá 1997 til 1998 hendi so aftur eitt lop uppá 12%. Serliga eru tað barnafamiljur, ið velja at seta búgv í Hornafjørðinum og elva til fólkavøksturin. Lyklaorðini aftan fyri menningina eru fjølbroytt fiskivinna, miðvís satsing uppá landbúnað, ferðavinnu og kunnleikamenning.

- Ein avgerandi táttur í framgongdini hevur verið semja og samstarv í býráðnum, hóast tað er býtt í ein meiri- og minniluta, sigur býarstjórin.

Í Íslandi hevur kvotuskipanin elvt til kapping um fiskin. Samvinnufelagið Kaupfelagið kom í stóra kreppu, og kommunan setti nógvan pening í; hóast mótstøðu í byrjanini, so valdi Kaupfelagsleiðslan at selja skip og virkir til lokalar íleggjarar, og kommunan fekk á tann hátt tað mesta av sínum peningi aftur.

Hornafjørðurin hevur fyrst og fremst valt at satsa uppá tosk, sild og lodnu. Havnarlagið í Høfn er tiltikið vandamikið, sum eisini føroyingar vita um at siga, og kommunan mátti tí gera stórar íløgur fyri at bøta um tað. Tær bøttu havnaumstøðurnar hava havt við sær ein stóran flota av glastrevjuútróðrarbátum, um 30-40, og nøkur størri skip, flestu 100-300 BRT, eru komin seinnu árini

Íslendsku jøklarnir eru tiltiknir, og Hornafjørðurin hevur valt at leggja doyin á teir í útlendskari marknaðarføring sum nakað serstakt, ikki bara fyri Ísland, men fyri Suðureysturlandið serliga. Fyri nøkrum árum síðani bygdi kommunan eina tænastumiðstøð, ið verður leigað ferðavinnufyritøkunum. Í Hornafirði eru ikki færri enn fimm hotel, av teimum trý nýggj, og hartil stórt tal av vallaraheimum. Í kjalarvørrinum á jøklaferðavinnuni er sprottin ein bóndagarðsferðavinna úti á bygd í kommununi, sum er í støðugari menning. Árliga kemur fjøld av útlendingum at vitja á Hornafjørðinum.

Í Høfn er stig tikið til ein sokallaðan kunnleikadepil. Hugsanin er at savna saman alla lokala vitan, ið kann vera av týdningi fyri menningina í økinum. Kommunan hevur tikið stigið til depilin, ið m.a. skal skapa eitt umhvørvi fyri menning av fiskaúrdráttum. Hornafirðingar hava eisini víst á, at tað er ikki meiri enn rímiligt, at Suðureysturlandið, har Vatnajøkul liggur, fær eina sterkari støðu tá ið tað kemur til jøklagransking. Universitetið í Reykjavík, Háskóli Íslands, hevur nú latið upp eina skrivstovu í kunnleikadeplinum í Høfn.

- Vit miðað eisini eftir at lata upp eina jøklaframsýning, ið eisini kundi verið umhvørvið, har vísindafólk úr øllum heiminum kunnu gjera granskingararbeiði innan jøklavísindi, sigur Albert Eymundsson.

Í kommununi eru eisini ætlanir um at gera Vatnajøkul og økið rundanum til eina sokallaða tjóðarpark

Tað, sum svarar til TK-stovu Eysturlandsins skal eisini halda til á nýggja kunningardeplinum. Longu nú er greitt, at níggju fyritøkur, ið fara undir nakað nýtt, fara at halda til har og samstarva við skúlaða fólkið í deplinum. Á Hornafjørðinum hava vantað størv til tað, ið býarstjórin kallar 'háskólamentað fólk', t.v.s. fólk við hægri útbúgving.

- Men eg vænti og vóni, at nýggi kunnleikadepilin fer at birta uppundir vinnulívið á hesum øki og fer at draga uppaftur fleiri hornafirðingar, sum hava tikið útbúgving aðrastaðni, til sín aftur, sigur Albert Eymundsson, býarstjóri.

## Grannastevna

**Rógvi Reinert, Kaldbak, skrivar**

# Fiskivinnan og lærda fólkið

*Vitan* er vorðin alt meira týðandi táttur av samfelagsmenningini. Hvussu er so statt við fólki við akdemiskari vitan innan høvuðsvinnu okkara? Hvussu er vitanin býtt við atliti til økismenning. Sum kunnugt hevur fiskivinnan lutfalsliga størri týdning uttan fyri Havnina, samstundis sum høvuðsstaðir vanliga draga flestar akademikarar til sín.

Ein skjótur fyrispurningur innan vinnuna vísir, at sera fáir persónar við akademiskari útbúgving hava leiðandi størv innan fiskivinnuna, tað veri seg sum stjórar ella í størvum, ið hava beinleiðis tilvísing til stjórnina:

**Leiðarastørv**

| | Størv í alt | Harav akademikarar | Akademikara-% |
|---|---|---|---|
| Reiðaravirksemi | 60 | 2 | 3,3 % |
| Fiskaframleiðsla | 40 | 3 | 7,5% |
| Alivinnan | 20 | 4 | 20,0% |

Yvirlitið vísir, at *fólk við akademiskari vitan ikki mynda leiðslurnar innan fiskivinnuna*. Sera lítil partur av tí akademiska kunnleikanum, ið vit flyta inn til Føroyar, verður sostatt partur av produktiva vinnulívinum. Hetta er so mikið meira løgið, tá ið hugsað verður um, at teir akademikarar, sum *hava* leiðarastørv innan høvuðsvinnuna, hava stórar avbjóðingar og góðar menningarmøguleikar.

Ikki kann kastast einum søgufrøðingi, einum fyrisitingarfrøðingi ella einum cand. mag. í donskum fyri, at teir ikki velja leiðarastørv innan høvuðsvinnuna.

Tey hava eina útbúgving og velja starv, ið miðar ímóti slíkum størvum. Og hvussu ber tað til, at sjálvt tey, sum velja fiskivinnurelevant fak, *heldur ikki* sýna fiskivinnuni áhuga! Hví finnast t.d. lívfrøðingar, cand. merc.'ar, búskaparfrøðingar og verkfrøðingar ikki í leiðandi størvum í fiskivinnuni í stórum tali?

Viðkomandi spurningurin er ikki hví føroyingar við akademiskari útbúgving ikki velja starv innan høvuðsvinnuna, men heldur: Hví velja føroyingar - uppvaksnir í einum fiskivinnusamfelag - næstan burturav útbúgving innan umsiting, heilsu- og undirvísingarverk, fíggingarvirksemi og lógfrøði heldur enn fiskivinnu? Og hvussu ber tað til, at sjálvt tey, sum velja fiskivinnurelevant fak, *heldur ikki* sýna fiskivinnuni áhuga!

Ein av orsøkunum er, at høvuðsvinnan er ikki høgt í metum, hóast hon útvegar umleið 95% av okkara útflutningsinntøkum. Tað er als ikki 'kall' at arbeiða sum tímaløntur á fiskavirki ella alibrúki í dag, og hugtakið 'ófaklærd arbeiðsmegi' er fest á hesi verkafólk. Hóast ein, ið hevur starvast í hesi vinnu í 30 ár, er vorðin serfrøðingar og meira 'faklærd/ur' enn kanska nakar annar, ja so verður hugtakið ikki broytt kortini. Hetta viðførir sjálvandi, at sambandið millum vinnuna og tey, ið ikki starvast í vinnuni, viknar.

Hesi viðurskifti síggjast aftur í sambandi við val av miðnámsútbúgving ella lærugreinum. Besta dømið er Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, ið hevur so lítla undirtøku sum fáur skúli í Føroyum. Annað dømi er lærugreinin 'fiskivinna' á HF- ella handilsskúla. Í fleiri førum er lærugreinin tikin av tímatalvuni, tí ongir næmingar velja hana. Fyrst í 80-unum tók eg HF prógv, og í flokkinum valdu 22 næmingar lærugreinina sálarfrøði, men bert 6-7 valdu fiskivinnu!

Veika støðan, ið fiskivinnan hevur í hugaheiminum hjá uppvaksandi ættarliðnum, førir ungdómin burtur frá fiskivinnuni. Leiðslurnar í vinnuni verða tískil myndaðar av fólki, ið hava drúgvar royndir innan vinnuna: Skiparar, ið virka sum reiðarar; høvuðsíleggjarar og stigtakarar innan alivinnuna, ið sjálvir mynda leiðsluna á teirra brúki; og innan flakavinnuna geva drúgvar arbeiðsroyndir, uppgávur á lægri leiðslustigi og lýdni móti arbeiðsgevaranum fólki møguleika at mynda leiðsluna, sjálvt um bókligi førleikin ikki er stórur.

Hinvegin má ásannast, at akademikarin hevur ikki havt samband við vinnulívið, og tað ið har rørist. Harafturat verður hansara vitan ikki beinleiðis eftirspurd, tí fólkið í vinnuni ikki hava havt sambandi við akdemiskt umhvørvi. Úrslitið verður, at hann ikki heldur seg framat, tá ið leiðarastørv verða tøk. Lættari er at halda seg til, tá ið landsstovnar, heilsu- ella umsitingarverk søkja eftir fólki við júst tí útbúgving, ið tann nýklakti hevur tilognað sær. Yrkisroyndirnar í hesum starvinum eggja neyvan til at søkja starv inna høvuðsvinnuna seinri – heldur tvørturímóti.

Hvat er til ráða at taka? Grundleggjandi er, at høvuðsvinnan verður meira virðismett. Hon má fáa størri pláss innan okkara undirvísingarverk, og størri dentur eigur at verða lagdur á hesa vinnu innan lestrarvegleiðing, so útbúgvingarmøguleikar innan hesa vinnu verða meira sjónligir – ikki bert møguleikar í Danmark, men eisini aðrastaðni.

Onnur týðandi fortreyt er, at vit fáa ein skipan, har starvsroyndir ávirka inntøkuna, so ein við størri royndum fær hægri løn enn ein við fáum royndum; hetta eigur at verða samantvinnað við eini starvsváttan (vinnubrævi), ið staðfestir arbeiðsroyndirnar hjá tí einstaka. Tá eru tey ikki longur 'ófaklærd'. Virðingin, bæði fyri teimum og vinnuni, verður harvið størri.

Triðja fyritreytin er, at fiski-/alivinnan og akademikarar vísa størri áhuga hvør fyri øðrum. Vinnan eigur at síggja, at høgt útbúgvð fólk er eitt tilfeingi, ið kann menna vinnuna, og tey lesandi mugu gerast greið yvir, at her *eru* stórar og spennandi avbjóðingar. Ein byrjan kundi verið, at lesandi útintu granskingar- ella ráðgevingaruppgávur fyri ali– og fiskivinnuna. Í hesum sambandi er samstarvið millum arbeiðsgeverafelagið og Meginfelag Føroyska Studenta dømi um eitt stig á røttu leiðini. Avgerðandi fyri lívførið hjá tiltakinum verður tó, at báðir partar miðvíst lívga um tað frá byrjanin.

# Skúlin og fiskivinnan

Tá ið vit ringja á fartelefonina hjá norðmanninum Arne Tunheim er eingin kjansur at tosa við hann. Hann er á floti við 55 fót stóra 'HavUng' saman við 14 6. floks næmingum úr Valderøy Barneskole. Samstundis eru 14 aðrir næmingar á einum flakavirki, 14 á einum alibrúki og 14 í fjøruni. Teir 56 næmingarnir eru partur av skúlaverkætlanini 'Havet, Båten og Folket', ið Arne Tunheim er leiðari fyri og sum fór av bakkastokki 1. august í fjør.

Odd Lennart Blindheim, leiðari á Fiskerifagleg Opplæringskontor er ein av stigtakarunum til verkætlanina.

- Eins og nógva aðrastaðni er trupult at fáa fólk til fiskivinnuna. Hetta er óheppið fyri samfelagið, men eisini spell fyri uppvaksandi ungdómin, tí orsøkin er í stóran mun vantandi kunnleiki til tær avbjóðingar og teir møguleikar, sum eru í fiskivinnuni. Endamálið við verkætlanini er at møta uppvaksandi ættarliðnum so mikið tíðliga, at áhugin fyri fiskivinnuni kann vekjast.

Hann heldur, at verkætlanin longu hevur havt positiv árin: Talið av umsøkjarum til Ålesund Maritime Skole at taka 'fiskerifagbrev' var 150% størri enn ári frammanundan.

8 skúlar í fýra kommunum eru við í verkætlanini, og tá ið 3-5 ár eru farin, er ætlanin at nýta verkætlanina sum grundarlag fyri einari fastari undirvísingarskipan í øllum skúlum. Kostnaðurin av verkætlanini er ein lítil millión árliga; av henni rindar staturin 400.000 kr., fiskivinnufyritøkur og reiðarí í kommununum 200.000 kr. og fiskivinnufeløgini útvið 200.000 kr. (reiðarafelagið, fiskimannafelagið, fiskasølufelagið o.o.).

Seinni greiðir Arne Tunheim frá sjálvari undirvísingini, ið fer fram á fýra floksstigum.

Í 4. flokki 'adopterar' hvør flokkur 'sítt' fiskifar. Tey vitja umborð, læra skip og manning at kenna. Eina ferð um vikuna – frá 4. til 10. flokk – samskifir flokkurin um INMARSAT-fylgisvein við fiskifarið. Útgerðin er á skúlanum. Tey fáa at vita, hvar báturin er staddur, hvørjum teir royna við og eftir, hvat teir hava fingið, hvussu nógvir mans eru við o.s.frv. Positiónin verður teknað á kortið, ið hongur í floksstovuni, og hinar upplýsingarnar verða so brúktar í ymiskum lærugreinum: Støddfrøði, landalæru, lívfrøði o.s.frv.

Í 6. flokki verður undirvíst í fiskalívfrøði og fiskivinnu, og so er tað tey skulu á fjørðin við 'HavUng', í fjøruna (herundir eftir rúsum, tey hava sett), á alibrúk og á fiskavirkir




og virkir, ið hava samband við fiskivinnuna (togvirkir, reiðskapsverksmiðjur o.a.).

Í 8. flokki arbeiða tey tvær vikur við eini verkætlan um eina fyritøku ella eitt reiðarí. Tey lesa ástøði í fimm dagar, tveir dagar eru tey á fyritøkuni og eygleiða og gera samrøður, og tríggjar dagar hava tey til at skriva frágreiðingina.

Í 10. flokki skulu tey greiða almenninginum frá um eina fiskivinnufyritøku á fløgu. Tey fáa undirvísing í einum telduforriti, og so verður farið til verka við at samstarva við fyritøkuna um, hvussu hon vil taka seg út millum almenningin.

Arne Tunheim sigur, at royndirnar eru stak góðar. Samstarvið við skúlarnar og við vinnulívið virkar stak væl, serstakliga tí báðir partar hava verið við frá byrjan. Og børnini eru hugagóð, eru sera áhugað og fáa nógv burturúr. Summi eru avgjørd og ætla sær í fiskivinnuna, og tað er gott í einum samfelag, sum fyri stóran part livir av fiskivinnu. Men summi ætla sær avgjørt ikki í fiskivinnuna, men Arne Tunheim sigur, at talan eisini er um almenna upplýsing.

- Verkætlanin kemur væntandi at hava positivan týdning fyri fiskivinnuna kortini. Líkamikið um tey enda sum advokatar, læknar, fyrisitingarfólk innan tað almenna, bankafólk ella annað, so skuldu tey verið betri før fyri at skilt fiskivinnuna í teimum førum tey koma at hava við hana at gera í teirra starvi, sigur Arne Tunheim.

# Ungdómurin: Dámar heimstaðin, men flytir kortini

Granskingarverkætlanin fyri Økismenning luttekur í einum altjóða samstarvi, partvís fíggjað og fyristaðið av ST-stovninum UNESCO. Hendan verkætlanin spurdi 10. floks ungdómar í 12 Norðuratlantiskum plássum um teirra heimstað og teirra framtíðarætlanir.

Líta vit at svørunum úr Vági og úr Klaksvík, so virðismeta tey ungu 'bygda' tilveruna høgt, serliga hennara tryggleika, sterku sosialu bond, náttúruupplivingar v.m. Nógv av teimum ynskja eisini fyri síni børn, at tey skulu hava eitt tílíkt umhvørvi at vaksa upp í. Niðurstøðan var, at "heimstaður mín hevur uppiborið at yvirliva".

Hinvegin var ein líka so greið niðurstøða, at "eg komi helst ikki at vera partur av hesi bygdaframtíðini"! Hóast gott skoðsmál til heimbygdina, so gera flestu ungdómar sær greitt, at teir ætla at flyta og ikki venda aftur. Ein orsøkin til hetta er helst val av útbúgving. At nema sær útbúgving er sjálvsagt ein ágóði. Men hvussu ber tað til, at tey ungu longu *áðrenn* tey flyta, hava hugsað sær til, at tey ikki fara at venda aftur til ein heimstað, teimum líkar væl? Ein heimildarmaður okkara úr Suðuroy undraðist t.d. á, at nóg mikið av arbeiði var í oynni, men tey ungu rýmdu kortini og komu ikki aftur eftir lokna útbúgving.

Sannlíkt er, at valið av útbúgving hjá teimum ungu hóskar illa við einum starvi á bygd. Eitt nú vita vit, at bæði fiski- og alivinnan hava trupulleikar at fáa fólk, og serliga væntar teimum ungar kreftir. Kanningar aðrastaðni vísa, at tá ið um framtíðarmenning ræður, so verður stríðið um ungdómin týdningarmiklari enn spurningurin um tilgongd av kapitali og rávøru.

Vit vita einki ítøkiligt um, hví hetta er so, og tí er heldur ikki lætt at skjóta upp nakrar loysnir. 'Ungdómurin og útjaðarin' verður høvuðsevnið okkara 2002; eitt hugskot kundi til dømis verið, hvussu vit í framtíðini loysa trupulleikan við rekruttering til fiskivinnuna. Í juni vóru vit á eini ráðstevna fyri ungdómsgransking, sum var í Helsinki. Har var møguleiki at seta seg inn í hvat fyriferst á økinum, og virðismikið samband var eisini knýtt til eina røð av líknandi granskingarumhvørvum.

# Smávirki: Gørn og handskar

Kring um í landinum eru fleiri størri og smærri framleiðsluvirki, ið ikki virka fisk. Summi teirra virka ymiskt til fiskivinnuna, onnur ikki. Eitt av hesum virkjum er NetaMontering á Oyri. Høvuðsvirksemið er – sum navnið sigur – at montera net.

Hjalgrímur Dahl tók stig til virkið fyri umleið seks árum síðani. Hjalgrímur sigur, at tá ið svartkalva- og havtaskufiskiskapurin tók seg upp, so dugdi hann at síggja ein møguleika í hesum. Hann hevur tað ikki frá fremmandum, tí pápi hansara gjørdi og bøtti sildaog toskagørn í 70- og 80'unum; sjálvur umvældi hann aliringar. Línurnar sjálvar verða innfluttar úr Noregi, meðan gørnini eru eystaneftir.

- Tað avgerandi er at vera 100% álítandi við levering, sigur Hjalgrímur.

NetaMontering hevur sín egna lastbil. Skipini boða frá, nær og hvar tey verða inni, og so ræður um at standa fyri teimum. Skipini fáa nýggj gørn umborð og onnur koma í land at fáa nýggj net sett á línurnar. Flutningin til Suðuroyar avgreiðir Strandferðslan, og tað samstarvið hevur riggað ómetaliga væl.

- Tað er eisini umráðandi. Bilurin hjá teimum kemur framvið her, fær gørnini umborð á Smyril, og SL í Suðuroy leverar til skipið, greiðir Hjalgrímur frá.

NetaMontering hevur eisini eina frammihjáframleiðslu, og tað eru handskar til sjófólk. Útgerðina keyti hann frá Sólarn Isaksen á Húsum fyri tveimum árum síðani. Sólarn arbeiddi burturav við handskunum og tað mól runt, sjálvt kreppuárini, men sigur, at tað rætta hevði verið at kombinera tað við onkrum øðrum virksemi. Hesum er Hjalgrím púra samdur í.

Umsetningurin av handskunum er bert uml. 150.000 kr. av reiðiliga 5 mió. kr. Hetta kann tykjast sum viðfáningur, men Hjalgrímur sigur, at eftirsum tikið verður til handskaframleiðsluna, tá ið netaframleiðslan liggur still, so hevur handskaframleiðslan ómetaligan týdning:

- Hon hevur við sær, at vit kunnu hava støðugt arbeiði til fólkið, og tað ger, at fólkið støðast.

Hvørki gørn ella handskar verða seld aðrastaðni enn í Føroyum, og einki verður gjørt við marknaðarføring, hvørki her ella uttanlands. Gørnini verða seld í beinleiðis samskifti við skipini, handskarnir gjøgnum heilsølurnar.

*- Skal tað vera smátt? Vit eru ein fiskivinnutjóð, hví eru vit so ikki ein av heimsins størstu framleiðarum av gørnum ella handskum?*

Hjalgrímur: - So skuldi tú havt sølufólk burturav, og tað ber framleiðslan ikki sum er; sjálvur eri eg t.d. uppi í øllum arbeiði, tó ongum, sum hevur við pappír at gera. Tú noyðist at byrja í smáum. Tað er umráðandi at leggja støðið og gera royndirnar á heimamarknaðinum, áðrenn vit fara út í heim, sum væl kundi hent.

Hjalgrím sigur, at tað er umráðandi at fáa í lag persónlig sambond fyri at reka eitt slíkt virki. Millum ár og dag er ymiskt, ið skal avgreiðast, sum førleiki ikki er til á virkinum, og heldur ikki grundarlag fyri at seta fólk í starv at avgreiða; tá er hent at hava gott samband við fólk, sum tú kanst heita á, ið hava neyðuga førleikan. Eisini er tað komið fyri, at væl nøgd viðskiftafólk í Føroyum hava víst útlendingum – bæði bretum og íslendingum – á okkum.

Níggju fólk starvast á virkinum. Hjalgrímur sigur, at NetaMontering kann kallast ein familjufyritøka.

- Eini trý úr familjuni arbeiða fast, og so eru fleiri, ið taka eitt tørn, tá ið brúk er fyri tí og tað liggur fyri, sigur Hjalgrímur.

Tvey av starvsfólkunum koma úr Hvalvík, eitt úr Haldórsvík og hini seks úr Sunda kommunu. Tey arbeiða øll fulla tíð og fara ikki heim á døgurða. Netamonteringin og handskaseymingin kunnu vera møðislig arbeiði, ið krevja serligt nærlagni, og tí hava tey tríggjar steðgir í arbeiðnum hvønn dag, hvør uppá 20 minuttir.

NetaMontering hevur keypt bygningin hjá Fiskaaling á Oyri, og ætlanin er at byggja út, so virksemið kann økjast. Um ársskifti vónar Hjalgrímur at netaparturin av útbyggingini kann takast í nýtslu, meðan handskaparturin vónandi verður klárur til várs.



*Netamonteringin er høvuðsarbeiði, men handskaframleiðslan er gott ískoyti, ið ger, at tær kviku hendurnar hava arbeiði fulla tíð*

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Umbróting:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Prent:**
Hestprent